Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Útlendsk arbeiðsmegi í Føroyum

Spurningar:

1. Gjalda útlendingar, sum arbeiða í Føroyum fyri útlendskar fyritøkur, skatt í Føroyum?
2. Gjalda útlendingar, sum eru leigaðir av útlendskari fyritøku, sum samstarvar við føroyska fyritøku, og gera arbeiðið í Føroyum, skatt í Føroyum?
3. Líkjast skattareglurnar í Føroyum reglunum í hinum Norðurlondunum?

Viðmerkingar:
Tað er vanligt, at skattur verður goldin í tí landi, har ein arbeiðir. Hóast korona hevur dempað virksemið nakað, arbeiðir nógv útlendsk arbeiðsmegi í Føroyum í hesum tíðum. Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftunum, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 3. mai 2021

Jóhannis Joensen